Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	28.04.2026
Mál nr.:	25/21617
Málsviðgjørt:	JEK
Ummælistíð:	Frá 29.10-12.11.2025
Eftirkannað:	17.04.2026

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)
(CRS og CARF – globalir standardar fyri umbýti av fíggjarligum upplýsingum millum skattamyndugleikar)

§ 1

Í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin), sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 109 frá 19. september 2023, sum broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 20. desember 2023, løgtingslóg nr. 39 frá 16. mai 2024, løgtingslóg nr. 145 frá 20. desember 2024 og løgtingslóg nr. 75 frá 30. apríl 2025, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 120 q, stk. 1, nr. 1, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"Viðvíkjandi kontueigarum, ið eru eindir, og sum ein ella fleiri persónar hava ræði á, kunnu upplýsingarnar eisini fevna um hesar persónar, eins og tann ella teir leiklutir, sum gera viðkomandi til ein ráðandi persón í eindini."

2. Í § 120 q, stk. 1, nr. 1 verður aftan á 2. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Harumframt kann fráboðanin fevna um upplýsingar um, hvørt ein galdandi eginváttan er til taks, og um kontan er ein felags konta, og í so fall talið av felags kontohavarum."

3. § 120 q, stk. 1, nr. 2 verður orðað soleiðis:
"2) Kontuslag og kontunummar, ella um einki kontunummar er, tað sum til praktisk endamál samsvarar við eitt kontunummar."

4. Í § 120 q, stk. 1, nr. 7 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Viðvíkjandi pørtum av eginogn, ið ein íløgueind, sum er ein løgfrøðilig skipan, eigur, kann fráboðanin eisini fevna um upplýsingar um tann ella teir leiklutir, sum gera, at tann persónur, ið fráboðast skal um, er eigari av pørtum av eginognini."

5. Aftan á § 120 q verður sett:

"**§ 120 r.** Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at veitari av kryptoognartænastum skal fráboða upplýsingar til TAKS um handlar, sum fevna um kryptoognir.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um mannagongdir til at eyðmerkja kryptoognarbrúkarar, sum veitari av kryptoognartænastum skulu fráboða um. Harumframt kann landsstýrisfólkið áseta reglur um, at veitarar av kryptoognartænastum skulu forða kryptoognarbrúkarum í at fremja fráboðanarskyldugar handlar, um kryptoognarbrúkarin ikki letur veitaranum av kryptovørutænastuni tær upplýsingar, sum skulu veitast sambært reglum, ásettum við heimild í 1. pkt."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og er galdandi frá og við inntøkuárinum 2026.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Við uppskotinum verður ein áseting í skattalógini broytt, og ein áseting kemur aftrat verandi ásetingum.

Ískoyti til CRS og áseting um CARF
Felagsskapurin fyri Búskaparligt Samstarv og Menning (OECD) kunngjørdi tann 10. oktober 2022 altjóða standardin "Crypto-Asset Reporting Framework" (CARF), sum viðvíkir fráboðan og upplýsingarskifti um transaktiónir við kryptoognum. Standardurin inniheldur einsháttaðar reglur fyri slíka fráboðanarskyldu, sum viðkomandi rættardømir (jurisdiktiónir) kunnu seta í verk.

Føroyar hava áhuga í at seta nevndu CARF-skipan í verk, tí hetta fer at merkja, at Føroyar kunnu skifta upplýsingar við lond og rættardømir, sum velja at ganga CARF-skipanini á møti. Ein týðandi partur av teimum mest viðkomandi veitarunum av tænastum innan kryptoognir fer fram uttanlands. Tí verður skotið upp at seta tær reglur í verk, sum eru neyðugar fyri at tryggja, at føroyska lóggávan livir upp til CARF-standardin, við tí endamáli, at Føroyar kunnu luttaka í avtalum um hetta.

OECD kunngjørdi somuleiðis tann 10. oktober 2022 nakrar broytingar í OECD's Common Reporting Standard (CRS) um upplýsingarskifti um fíggjarligar konti. Tann týdningarmesta broytingin skal tryggja, at ávísar e-peningavørur verða fevndar av virkisøkinum hjá CRS.

OECD hevur gjørt bæði CARF og CRS til altjóða standardar. Hetta merkir, at OECD mælir limalondunum og øðrum londum til skjótast gjørligt at seta standardarnar í verk. Global Forum on Transparency and Exchange of Information for Tax Purposes fer at hava eftirlit við fremjanini av standardunum.

Føroyar hava tann 26. november 2024 undirskrivað CARF og broytingarnar í CRS. Ígildissetanin hjá hvørjum einstøkum landi krevur, at tey viðkomandi londini senda eina rød av fráboðanum til OECD, harímillum fráboðan um, at landið hevur sett neyðugu lóggávuna í verk fyri at kunna fremja CARF og broytingarnar í CRS. Føroyar eru ikki rættarliga bundnar av CARF, fyrr enn hesar fráboðanir eru sendar til OECD.

Endamálið við hesum lógaruppskoti er tí eisini at leggja grundarlagið fyri, at neyðugu reglurnar um hóskandi nærlagni (due diligence) og fráboðan kunnu setast í verk í Føroyum, so Føroyar kunnu senda hesar fráboðanir til OECD.

Við at samtykkja lógaruppskotið gevur Løgtingið samtykki sambært § 52 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya til, at landsstýrið kann senda tær neyðugu fráboðanirnar fyri at seta CARF og broytingarnar í CRS í verk.

1.2. Galdandi lóggáva
Føroyar hava í galdandi lóggávu reglur um eyðmerking og fráboðan av fíggjarkontum við tilknýti til útheimin.

Við uppskotinum verða hesar reglur dagførdar, eins og uppskotið ásetir nýggjar reglur um kryptoognir.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at fáa Løgtingsins samtykki sambært § 52 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya til, at landsstýrið kann senda tær neyðugu fráboðanirnar fyri at seta CARF og broytingarnar í CRS í verk.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verða galdandi reglur um eyðmerking og fráboðan av fíggjarkontum til tilknýti til útheimin dagførdar, og samstundis ásetir uppskotið nýggjar reglur um kryptoognir.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá Vinnuhúsinum, TAKS, Felagnum Føroyskir Grannskoðarar og Felagnum Føroyskir Peningastovnar.

Uppskotið hevur somuleiðis verið til almenna hoyring á hoyringarportalinum hjá Føroya Landsstýri.

Hoyringarsvar eru komin frá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar, Føroya Arbeiðsgevara Felag og Felagnum Peningastovnar.

Felagið Føroyskir Grannskoðarar hevði viðmerkingar til tað uppskotið, sum var til hoyringar, men ásetingin, sum felagið hevði viðmerkingar til, er seinni tikið úr uppskotinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag boðar í hoyringarsvari sínum frá, at felagið tekur undir við, at skattalóggávan verður dagførd samsvarandi teimum altjóða standardum, sum Føroyar hava bundið seg til at halda, og at skattalógin í hesum sambandi m.a. fær dagførdar reglur um kryptoognir.

Fíggjarmálaráðið tekur hoyringarsvarið til eftirtektar.

Felagið Peningastovnar hevur í hoyringarsvari sínum m.a. sóknast eftir neyvlýsingum við atliti at hugtøkunum “eginváttan” og “Íløgueind”.

Fíggjarmálaráðið tekur hoyringarsvarið frá Felagnum Peningastovnar til eftirtektar, og hevur broytt uppskotið samsvarandi.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Roknað verður ikki við, at uppskotið hevur vanligar rakstrarútreiðslur, t.d. lønir, við sær. Tó er neyðugt at tillaga og víðarimenna KT skipanirnar hjá TAKS.

Verandi CRS-skipan hjá TAKS kann ikki innheinta ella umbýta CARF-upplýsingar ella CRS Addendum-upplýsingar, og er tí neyðugt at tillaga CRS-skipanina umframt at menna eina nýggja skipan (modul), sum kann innheinta og umbýta CARF-upplýsingar.

Tillagingin av CRS-skipanini er mett at kosta umleið 400 tús. kr. og rúmast innan játtanina hjá TAKS. Menningin av nýggjum moduli til at innheinta og umbýta CARF-upplýsingar verður mett at kosta umleið 800 tús. kr. Neyðugt er at útvega fígging við eykajáttan í 2026.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri TAKS í sambandi við, at skipanir skulu uppstigast.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið viðvíkur tveimum millumtjóðasáttmálum, sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

Talan er um CRS og CARF, sum eru styttingar fyri ávikavist Common Reporting Standard og Crypto-Asset Reporting Framework.

Føroyar undirskrivaðu CRS í 2014, og byrjaðu í 2017 við heimild í lóggávu, sum varð skrivað við støði í CRS, at eyðmerkja og sínámillum fráboða fíggjarkontur við tilknýti til útheimin.

Við uppskotinum verður CRS uppstigað við einum ískoyti, einum sonevndum Addendum.

Hin millumtjóðasáttmálin snýr seg um kryptoognir. Við lóggávu, sum verður skrivað við støði í CARF, fara Føroyar at eyðmerkja og sínámillum fráboða upplýsingar um kryptoognir við tilknýti til útheimin.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið hevur ongar avleiðingar innan fyri Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar viðvíkjandi EMRS.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar viðvíkjandi Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá teimum, sum bera brek.

2.9. Markaforðingar

Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld

Talan er um eitt skattauppskot.

2.12. Gjøld

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?

Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar persónur, men krevur at verandi skipanir hjá TAKS verða uppstigaðar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Lógaruppskotið gevur í ávísan mun landsstýrisfólkinum heimild at áseta nærri reglur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Til nr. 1

Sambært § 120 q, stk. 1, nr. 1 í skattalógini kann landsstýrisfólkið áseta reglur um, at figgjarstovnar árliga skulu fráboða upplýsingar um navn, bústað, p-tal, v-tal og útlendsk eyðkennisnummur, umframt onnur eyðkenni viðvíkjandi kontueigarum og upplýsingar um, hvørji lond ella øki hesir eru knýttir at. Um kontuhavarin er ein løgfrøðilig eind við einum ella fleiri persónum, sum hava ræði á eindini, kann fráboðanarskyldan eisini fevna um hesar persónar.

Tað verður ikki mett, at ásetingin gevur heimild til, at landsstýrisfólkið kann áseta reglur um fráboðan av tí ella teimum leiklutum, sum ein persónur við ræði yvir viðkomandi eind hevur. Í CRS verður tosað um eindir við einum ella fleiri ráðandi persónum. Hetta hugtakið er nakað víðari enn ein løgfrøðiligur persónur, tí tað fevnir eisini um løgfrøðiligar skipanir, so sum trusts. Við ymisku orðingunum er ikki ætlað at víkja frá CRS, og ásetingin skal tí tulkast í samsvar við CRS.

Tær uppskotnu broytingarnar hava við sær, at ásetingin verður víðkað, soleiðis at tað framgongur, at landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at krav kann setast um fráboðan av upplýsingum um tann ella teir leiklutir, sum ein persónur hevur, og sum grundgeva, at hann hevur ræði yvir eini eind. Harumframt hava broytingarnar við sær, at orðingin í ásetingini kemur í betri samsvar við tær samsvarandi reglurnar í CRS. Reglurnar um fráboðan av leiklutum hjá ráðandi persónum verða settar inn í CRS-kunngerðina við eini broyting av henni.

Til nr. 2

Sambært § 120 q, stk. 1, nr. 1 í skattalógini kann landsstýrisfólkið áseta reglur um, at figgjarstovnar árliga skulu fráboða eina rød av upplýsingum um tann, sum fráboðanin viðvíkur, sí nærri lýsing í viðmerkingunum til § 1, nr. 2.

Galdandi áseting verður ikki mett at heimila landsstýrisfólkinum at áseta reglur um, at fráboðanir skulu innihalda upplýsingar um, hvørt ein galdandi eginváttan er til taks, og um kontan er ein felagskonta og í so fall talið av felags kontuhavarum. Hetta krevur CRS-ískoytið.

Skotið verður upp, at § 120 q, stk. 1, nr. 1 verður broytt við einum 3. pkt., har tað verður ásett, at fráboðanin eisini kann fevna um upplýsingar um, at ein galdandi eginváttan fyriliggur og í so fall talið av felags kontuhavarum.

Tann uppskotna broytingin merkir, at tað kann ásetast í reglum, at fráboðanin skal fevna um upplýsingar um, hvørt ein galdandi eginváttan fyriliggur frá tí, sum fráboðað verður um, og um kontan er ein felags konta og í so fall talið av felags kontuhavarum.

Harumframt merkja tær uppskotnu broytingarnar, at orðingin í ásetingini kemur í betri samsvar við tær samsvarandi reglurnar í CRS.

Tær viðkomandi reglurnar verða settar inn í CRS-kunngerðina við einari broyting av henni.

Til nr. 3

Sambært § 120 q, stk. 1, nr. 2 kann landsstýrisfólkið áseta reglur um, at fíggjarstovnar árliga skulu lata upplýsingar um kontonummar, ella tað sum í verki svarar til kontonummar, um slíkt ikki finst. Ásetingin gevur ikki heimild til, at landsstýrisfólkið kann áseta reglur um fráboðan av kontosløgum. Tí verður skotið upp, at "kontosløg" verður sett inn frammanfyri "kontonummar".

Hetta uppskotið merkir, at § 120 q, stk. 1, nr. 2 í skattalógini eisini fer at geva heimild til, at landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at upplýsingar um kontusløg skulu fráboðast. Hetta kann fevna um, hvørt talan er um innskotskonto ella umsitingarkonto o.s.fr., og um talan er um eina verandi ella nýggja konto.

Til nr. 4

Sambært § 120 q, stk. 1, nr. 7 kann landsstýrisfólkið áseta reglur um, at fíggjarstovnar árliga, fyri kontur, sum ikki eru innskots- ella umsitingarkontur, skulu fráboða samlaðu bruttoupphæddina, sum er goldin til ella góðskrivað kontuhavaranum viðvíkjandi álmanakkaárinum. Henda áseting fevnir m.a. um partar av eginpeningi í íløgueindum.

Mett verður ikki, at ásetingin gevur heimild til, at landsstýrisfólkið kann áseta reglur um fráboðan av pørtum í eginpeningi í eini íløgueind, sum er ein løgfrøðilig skipan, um tann ella teir leiklutir, sum persónurin, ið fráboðast skal um, hevur, og sum grundgeva fyri, at viðkomandi er partaeigari í eginpeningi.

Tí verður skotið upp, at eitt 2. pkt. verður sett inn í § 120 q, stk. 1, nr. 7, har tað verður ásett, at "Viðvíkjandi pørtum av eginogn, ið ein íløgueind, sum er ein løgfrøðilig skipan eigur, kann fráboðanin eisini fevna um upplýsingar um tann ella teir leiklutir, sum gera, at tann persónur, ið fráboðast skal um, er eigari av pørtum av eginognini."

Uppskotið merkir, at ein áseting verður sett inn, sum gevur landsstýrisfólkinum heimild til at áseta reglur um, at fráboðanin, viðvíkjandi pørtum av eginognini, sum hildin av ein íløgueind, sum er ein løgfrøðilig skipan, skal fevna um upplýsingar um tann ella teir leiklutir, sum persónurin, ið fráboðast skal um, hevur. Hetta kann t.d. vera í leiklutin sum ein trustee í einum trusti.

Hesar reglur verða settar inn í CRS-kunngerðina og hava við sær, at fráboðanarskyldugu fíggjarstovnarnir skulu útbyggja fráboðanirnar viðvíkjandi pørtum av eginognini, sum verður hildin í einari íløgueind, sum er ein løgfrøðilig skipan við upplýsingum um tann leiklut ella teir leiklutir, sum persónurin, ið fráboðað verður um, hevur, og sum hava ført til fráboðanina um viðkomandi.

Máliskan: Íløgueind, Investment Entity, merkir ein eind,

1) ið sum liður í handilsrakstrarviðurskiftum í høvuðsheitum fremur eina ella fleiri av fylgjandi virksemum ella tiltøkum fyri ella vegna ein kunda:
   a) handil við pengamarknaðarløgskjølum, t.v.s. kekkum, vekslum, innskotsprógvum, avleiðslum o.ø., gjaldoyraveksling, keypskálaskjølum, rentuskjølum og indeksskjølum, umsetiligum virðisbrøvum ella rávøruterminsavtalum,

b) einstaklinga og samognar skuldabrævaumsiting, ella
c) annað slag av íløgu, umsiting ella fyrisiting av Fíggjarligum ognum ella peningi vegna aðrar persónar ella

2) um bruttoinntøkan í høvuðsheitum kemur frá íløgu, enduríløgu ella handli við Fíggjarligum ognum, um Eindin verður fyrisitin av einari aðrari Eind, sum er ein Innskotsstovnur, ein Fyrisitingarstovnur ella eitt Specificerað tryggingarfelag ella Íløgueind sum lýst í nr. 1.

Stk. 2. Ein Eind verður mett sum sum liður í handilsrakstrarvirksemi sínum í høvuðsheitum at fremja eina ella fleiri av teimum virksemum, sum eru lýst í stk. 1, nr. 1, ella ein Einds bruttoinntøka kann í høvuðsheitum roknast at koma frá íløgu, enduríløgu ella handli við Fíggjarligum aktivum til tey endamál, sum eru nevnd í stk. 1, nr. 2, tá bruttoinntøkan hjá Eindini, sum kann heimførast til viðkomandi virksemi, svarar til ella fer uppum 50 prosent av bruttoinntøkuni hjá Eindini í tí stytsta av fylgjandi tveimum tíðarskeiðum:

1) tað tríára tíðarskeið, sum endar tann 31. desember í árinum frammanundan árinum, har ásetingin verður gjørd, ella
2) Tíðarskeiðið, Eindin hevur verið til.

Stk. 3. Máliskan: Íløgueind, fevnir ikki um eina Eind, sum er eitt Aktivt NFE, tí viðkomandi Eind lýkur eina ella fleiri av treytunum í § 47, nr. 4-7.

Stk. 4. Stk. 1-3 skulu tulkast í samsvari við orðaljóðið í allýsingini av Fíggjarligur stovnur í tilráðingini frá tí Fíggjarliga Atgerðarbólkinum, Financial Action Task Force.

Til nr. 5

Í galdandi føroyskari skattalóggávu er einki krav um, at veitari av kryptoaktivtænastum automatiskt skulu fráboða upplýsingar um brúkarar av kryptoaktivum og teirra transaktiónir. Tí eru heldur ongar reglur um hóskandi nærlagni (due diligence) til nýtslu í sambandi við at eyðmerkja brúkarar av kryptoaktivum, sum skulu fráboðast, ella tær transaktiónir, sum fráboðast skal um, ella tær upplýsingar, sum skulu fráboðast. Tí verður skotið upp, at ein § 120 r verður sett inn í skattalógina, har landsstýrisfólkið fær heimild til at áseta reglur um, at veitarar av kryptoaktivtænastum skulu fráboða upplýsingar til TAKS um transaktiónir, sum fevna um kryptoognir. Harumframt verður skotið upp, at landsstýrisfólkið kann áseta reglur um mannagongdir til eyðmerking av brúkarum av kryptoaktivum, sum veitarar skulu fráboða um. Í § 120 r, stk. 1, 2. pkt. verður skotið upp, at landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at veitarar av kryptoaktivtænastum skulu forða brúkarum í at fremja fráboðanarskyldugar transaktiónir, um brúkarin ikki veitir tær upplýsingar, sum eru sambært reglunum í § 120, stk. 1, 1. pkt.

Samanlagt merkir uppskotið í § 120 r, stk. 1 og 2, at landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at veitari av kryptoaktivtænastum skal hava mannagongdir fyri hóskandi nærlagni (due diligence) til eyðmerking av brúkarum og upplýsingum, sum fráboðast skal um.

Tær uppskotnu reglurnar geva landsstýrisfólkinum heimild til at seta í verk reglur um skyldur hjá veitara av kryptoaktivtænastum í føroyskari lóggávu.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 28. apríl 2026

Aksel V. Johannesen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Felagnum Peningastovnar
Fylgiskjal 5: International Standards for Automatic Exchange of Information in Tax Matters – Crypto-Assest Reporting Framework and 2023 Update to the Common Reporting Standard